Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Suðuroyartunnilin

Spurningar:

1. Nær ætlar landsstýrismaðurin at kalla inn til fundar um politiskar semju um Suðuroyartunnilin?
2. Hvussu gongur við undankanningunum til Suðuroyartunnilin, og nær eru tær lidnar?
3. Nær kann væntast at klárt er at bora?
4. Er ætlanin framvegis, at peningur fyrst skal játtast frá 2025?
5. Kemur ætlanin, at tað skal vera koyrandi í 2030 at halda?

Viðmerkingar:
Sum skilst gongur væl at bora Sandoyartunnilin, og skotið verður møguliga ígjøgnum seinni í ár.
Fyrireikingar verða í løtuni gjørdar til Suðuroyartunnilin, og enn eru hesar ikki lidnar. Tað er upplýst fyri Løgtinginum, at fyrstu játtanirnar til Suðuroyartunnilin verða latnar í 2025. Tað er eisini upplýst, at tað tekur millum 7-9 ár at gera Suðuroyartunnilin, og at hetta er aftaná fyrireikingar, undankanningar og projekteringar eru gjørdar. Tískil er spyrjarin stúrin, um tað fer at bera til at halda málið um, at tað skal vera koyrandi til Suðuroynna í 2030.
Landsstýrismaðurin hevur fyrr upplýst, at hann ætlar at kalla politisku flokkarnar á fund um Suðuroyartunnilin. Enn er eftir at finna politisku semjurnar um fígging, linjuføring, standardar, partafelag o.a. Fyri at tryggja at gongd er í málinum, og at tíðarætlanin kemur at halda, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 2. august 2021

Sirið Stenberg